*»Norðoyggjar í eina kommunu«. Soleiðis sær skemtiteknarin, Óli P fyri sær at allar oyggjarnar í økinum gerast ein stór kommuna*





*Viðingar hava enn ikki tikið støðu til samanlegging við Klaksvík. – Vit vilja fyrst vita, hvat vit skulu taka støðu til, sigur borgarstjórin, Hans Jákup Kallsberg*

*Mynd: vidareiði.fo*

> *Mín persónliga meining er, at ein missir ov nógv í nærdemokrati'inum, um ein leggur saman við eini stórari kommunu*
>
> *(John Damberg, Kunoy)*

longu farnar uppí ta stóru kommununa; onkur kommuna er tøvandi; meðan aðrar eru beinleiðis ímóti ætlanini.

> *Vit fara ikki upp í Klaksvíkar kommunu, fyrrenn vit verða noydd til tað*
>
> *(Veronika Petersen, Hvannasund)*

Ein kommuna sum av álvara hevur viðgjørt hetta málið, er Hvannasunds kommuna. Her var arbeiðið komið so langt, at ein samstarvsavtala var klár at skriva undir, hóast limirnir í bygdaráðnum als ikki vóru samdir í hesum máli, millum annað borgarstjórin sjálvur, ið var hart ímóti ætlanini.

Treytin fyri hesi avtaluni var, at fólkið í Hvannasundi og Norðdepli vildi tað sama sum meirilutin í bygdaráðnum. Men undir eini fólkaatkvøðu í september mánaði 2008 um sama mál søgdu borgararnir greitt frá síni mótstøðu ímóti ætlanini.

Hóast sagt verður, at tíðin lekir øll sár, so er støðan enn í dag, nú vit eru farin inn í mars mánað 2010, hin sama í Hvannasunds kommunu.

Hóast tey ikki hava viðgjørt málið í hesum bygdaráðnum, er støðutakanin einki broytt:

– Nei, vit fara ikki uppí Klaksvíkar kommunu, fyrrenn vit verða noydd til tað, sigur borgarstjórin Veronika Petersen.

Um orsøkina til hetta er stutta svar hennara: – Ein vil ráða sær sjálvum, so leingi sum gjørligt!

## Kunoy: Vit drukna

At Sundafólk vóru so avgjørd við fólkaatkvøðuna á heysti 2008, kann hava ávirkað fólkið í hinum kommununum í Norðoyggjum.

Í øllum førum er greitt, at bygdaráðið í Kunoy, ið fevnir um bygdirnar Kunoy og Haraldssund, heldur ikki vil leggja saman við Klaksvík.

Bygdaráðið hevur ikki viðgjørt málið, men tað hevur kortini verið til umrøðu. Og heldur ikki her er serliga stórur áhugi fyri samanlegging, vísir borgarstjórin, John Damberg á.

– Vit hava eina lítla kommunu við 150 íbúgvum, her tað ikki er so stór fjarstøða millum borgaran og bygdaráðið. Mín persónliga meining er, at ein missir ov nógv í nærdemokrati'inum, um ein leggur saman við eini stórari kommunu.

– Tað kann bara enda við, at vit drukna í tí stóra samanhanginum, slær John Damberg fast.

## Viðareiði: Bíða

Í Viðareiðis kommunu hevur ein heldur ikki enn viðgjørt samanlegging við Klaksvík. Hans Jákup Kallsberg, borgarstjóri sigur, at málið er ikki aktuelt enn.

– Vit bíða framvegis eftir, at landið meldar út, hvat ætlanin er, til dømis innan skúlaverkið og samanleggingar av kommunum, sigur hann.

Sjálvur hevur hann onga viðmerking til sína persónligu áskoðan á málið. Tí, sum hann sigur:

– Vit kunnu ikki taka støðu fyri ella ímóti nøkrum, fyrrenn vit vita, hvat vit skulu taka støðu til.

Kommunurnar í Klaksvík og Viðareiði er tó í dialogi um at samstarva um tey málini, ið ein kann samstarva um.

# Fugloy: Verða helst tvingað saman

**– Vit hava ikki viðgjørt spurningin, men vit verða helst bara tikin uppí eina aðra kommunu, fyrr sum seinni, staðfestir borgarstjórin í Fugloyar kommunu, Zacharias Zachariassen.**

**Hann staðfestir tað sama sum aðrir av starvsfelagum hansara, at kommunan er ov lítil til at megna allar tær skyldurnar, ið eru og verða lagdar út á tær at umsita.**

**– Men sjálvandi, – leggja hinar kommunurnar í Norðoyggjum saman við Klaksvík, so mugu vit eisini uppí. Annars detta vit so fullkomuliga burtur ímillum, staðfestir borgarstjórin í Fugloyar kommunu, ið fevnir um bygdirnar Hattarvík og Kirkju.**



*– Kanska var best um tær smærru kommunurnar vóru saman, sigur Zacharias Zachariassen, borgarstjóri í Fugloy*

*Savnsmynd: klaksvik.fo*

**Hann vísir til umstøðurnar hjá svínoyingum, sum longu eru farnir uppí Klaksvíkar kommunu. Sambært honum hevur hetta ikki bert verið positiv gongd.**

**– Eg havi skilt, at um tey skuldu skifta eina peru út í einum lyktapela, so mugu fólk úr Klaksvík út hagar at gera tað. Fyrr gjørdu tey tað sjálvi, staðfestir hann.**

**Sjálvur kann Zacharias Zachariassen ikki vera ímóti at leggja saman við ta størru kommununa:**

**– Eg kann væl ikki vera ímóti tí. Men kanska hevði tað verið betri, um tær smærru kommunurnar vóru í einum.**